Fleiri rásir - einki roks

DR2 - Sunnudagin kl. 15.00

# Heimsins størsti lygnari

Eftir filmarnar »Time Bandits« og »Brazil« fullgjørdi Terry Gillian sína trilogi um markið millum veruleika og ímyndir við filminum um brøgdini hjá Munchausen baróni

Longu í tíðini við Monty Pyton prógvaði Terry Gillian, at hansara hugflog rakk væl longur enn hjá flestu øðrum leikstjórum, og við søguni um heimsins størsta lygnara fekk hann eisini fatur í nøkrum, sum hóskaði til hansara sinnalag.

Søgan um Munchausen er søgan um stóra lyguvættið, sum ikki uttan orsøk varð víðagitin, og bara tað at fylgja við í øllum lygnunum setir síni krøv til leikstjóran.

Eitt tekur barónurin alt fyri eitt heiðurin, tá turkararnir leypa á heimbygd hanara. Turkiski sultánurin er tó ikki serliga fegin um hetta, og tí vil hann hava hevnd. Í bygdini er eingin, sum trýr Munchausen, men tá turkarar áhaldandi gera býin til bumbumál, má okkurt gera. Og barónurin skal nú út í heim at prógva sínum páhaldum.

Í ballón fer hann nú at fáa fatur á fýra vinum, sum kunnu hjálpa sær í hesum. Teir fýra eru heimsins sterkasti maður, Albrecht. Heimsins skjótasti maður, Berthold. Maðurin við heimsins bestu eygum, Adolphus. Og so maðurin við størstu lungunum, Gustavus, ið kann blása sjálvt ein orkan um koll.

Ferðin førir barónin víða um, og millum annað er hann bæði á mánanum og í jarðarkjarnuni, men spurningarnir eru, hvørt hann megnar at finna teir fýra fylgisveinarnar í nóg góðari tíð, soleiðis at heimbygdin kann bjargast.



John Neville hevur leiklutin sum Munchausen, barónur



*Talan verður um eina hendingaríka ferð, tá mytomaniski barónurin sigur seg vera mannin, sum kann bjarga heimbygdini undan turkiska álopinum*

# Tempo

Talan er um ein film, sum greiðir frá einum intensum tríkantsdrama. Vit eru í París, har Jack og Sylvia nú búgva. Jack er ein professionellur amerikanskur tjóvur, og Sylvia, ið er nakað eldri, hevur so sanniliga eisini sínar døkku síðu. Hennara arbeiði er millum annað at selja tjóvagóðs.

Ein dagin, tá Sylvia fer í býin eftir einum virðismiklum gimsteini, hittir Jack eina yngri amerikanska kvinnu, sum starvast í einum smúkkuhandli. Jack verður forelskaður í Jenny, sum hendan eitur, men tá hann finnur útav, at Sylvia er álopin, og at gimsteinurin er rændur frá henni, kemur hann í eina álvarsliga tvístøðu. Fyri at hjálpa Sylviu, er Jack nevnliga noyddur til at ræna handilin, har Jenny starvast. Tað skuldi sum so ikki volt nakrar trupulleikar, men forðingarnar í hesum eru nógv fleiri, enn Jack upprunaliga helt.

3+ - Mikudagin kl. 20.00



*Hugh Dancy og Rachael Leigh Cook hava leiklutirnar sum ávíkavist Jack og Jenny*



*Eisini síggja vit Melanie Griffith á skíggjanum í hesum filminum*